# r í altjóða fiskikappingini



*Stevnudámur var yvir bryggjuni í gjár, tá ið bátarnir við fiskimonnunum vóru komnir aftur. Í tjaldinum fæst etandi og leskandi, og básar eru við fiskiútgerð og ullavørum. Eisini hevur ferðavinnan bás við kunnandi tilfari um Føroyar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

og luttakandi bátarnir skulu vera aftur at landi við dagsins fongi í seinasta lagi klokkan 16.30.

Tá ið kappingin er liðug hósdagin, verður funnið út av, hvørjir vinnararnir eru.

Teir, sum eru við í fiskikappingini, fáa tilsamans fimm tímar at fiska í hvønn dagin. Tíðin verður roknað frá tí, at skiparin hevur lagt bátin, og fiskimenninir eru farnir til tráðurnar.

Tveir tímar eru lagdir av til sigling út á fiskileiðirnar og tveir tímar heimaftur.

Ymiskt er, nær bátarnir eru aftur at landi. Hetta veldst um, nær teir eru byrjaðir at fiska. Teir fyrstu bátarnir hvønn dagin eru væntandi aftur um 15-tíðina.

Altjóða reglar fyri slíkum kappingum eru eisini galdandi í kappingini, sum Smyril Line saman við Green Gate Incoming og Runavíkar kommunu skipa fyri.

## Onnur tiltøk

Í sambandi við stóra tiltakið verður eisini skipað fyri listaframsýningum, mótaframsýningum og tónleiki.

Klokkan 16 í gjár lótu soleiðis tvær listaframsýningar upp í Runavíkar kommunu.

Í býráðshøllini er framsýning við verkum hjá Eli Smith, og í Gamla handli í Heiðunum sýnir Oggi



*Nógv er at práta um eftir loknan og spennandi dag. Til høgru á myndini sæst talvan, har fólk kunnu fylgja við gongdini í fiskikappingini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*